

## Crouch bankaði Arsenal

Við trimum málum var Peter Crouch høvuðsmaðurin handan avsmurninginum, sum Arsenal fekk leygardagin í Liverpool.
Tað vóru bert gingnir fimm minuttir, tá ið Crouch var á rætta staðnum. Hann fekk eitt innlegg frá høgru síðu, og frammanfyri málinum sveik hann ikki. Og 10 minuttir fyri steðgin var tað aftur Crouch, ið var hægstur eftir innlegg frá vinstru síðu, og setti høvdið á bóltin. Í seinna hálvleiki økti Daniel Agger til 3-0, áðrenn William Gallas minkaði um munin. Crouch fekk tó seinasta orðið, tá ið hann skoraði til úrslitið 4-1.

## Sevilla misti týdningarmikið fet

Sevilla hevði sunnudagin møguleikan at leggja seg ájavnt við FC Barcelona á fyrsta plássi í sponsku La Primera, men teir lillaðu tóku ikki av. Teir spældu ein skuffandi málleysan javnleik, tá ið teir fóru á vitjan hjá Osasuna. Sevilla hevði trupulleikar við at skapa málmøguleikar, og tá ið heimaliðið ikki dugdi betur, so var ikki meir enn sannlíkt, at dysturin endaði 0-0. Sevilla er tískil tvey stig aftanfyri FC Barcelona á fyrsta plássi.

*B71*

*NSÍ*

B71-NSÍ 0-1 (0-0):

# Fortuna var í parti við NSÍ

**Eftir at B71 dygst undan leikloki hevði havt bóltin á tvørtrænum aftanfyri Jens Martin, skoraði Óli Hansen NSÍ sigursmálið í evstu løtu**

**B71-NSÍ**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er ikki altíð so langt millum svartastu óeydnu og ljósastu eydnu í fótbólti. Tað kunnu øll tey, sum vóru eygnavitni til landskappingardystin millum B71 og NSÍ skriva undir uppá.

Uppløgdu málmøguleikarnir vóru fáir og smáir, og sum seinna umfarið leið, so bendi alt á, at talan skuldi verða um málleysan javnleik. At fáa stig í fyrstu royndini eftir uppflytingina hevði verið at liva við hjá B71. Serliga tá ið havt verður í huga, at mótstøðuliðið var eitt liðunum, sum verður roknað millum evnini at vinna heiðursmerki.

At vunnið fulla úrtøku hevði verið framúr hjá B71. Men tað var júst hetta, sum var um reppið stutta løtu undan at vanliga leiktíðin var farin. Jónsvein Thomsen hevur gott máltev. Miðskeiðis í 2. hálvleiki varð hann skiftur inn á B71 miðvøllin. Stutt undan leikloki breyt Clayton ígjøgnum í vinstru, og Jónsvein var fyrstur á innlegginum, sum hann við høvdinum smekkaði ímóti málinum. Bólturin brast í tvørtræið og aftur í spæl.

Marginalirnir vóru við, tá ið royndt varð við stútara ímóti málinum hjá Símun Rógva Hansen. Innskifti unglingaspælarin Øssur Dalbúð royndi móti málinum, men bólturin varð blokeraður til horna. Innleggið var gott, og Óli Hansen var hægstur og drønstútaði í B71 meskarnar.

Veldugur fagnaður á gestunum, og heimamenninir stóðu sum negldir. Soleiðis er fótbóltur eisini!



*Tað var beiskt hjá B71, at NSÍ snýtti teir í yvirtíðini og fór avstað við øllum trimum stigunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Ótrygt spæl

NSÍ legði bragdliga fyri. Fyrsta lítla korterið var ferðin høg, teir funnu væl hvønn annan, og tað tóktust vera ábendingar um, at útisigurin var vísur. Men NSÍ megnaði ikki at spæla seg ígjøgnum heimaverjuna, og tað var so skjótt, at teir dovnaðu og spælið gjørdist meiri javnt.

Hjá heimaliðnum var superveteranurin Eli Hentze stýrimaður á verjukenda miðvallar plássinum. Hann hirsaði við viðspælarunum og lúrdi støðugt eftir sendingum fram til Clayton at renna eftir.

Sjúrður Jacobsen var á sentrala NSÍ miðvøllinum fyri skadda Boga Løkin, og Hjalgrím Elttør, sum saman við Jónhardi Frederiksberg var eitt sindur aftanfyri Andersson, stríddist sum úlvur á skóg bæði í álopi og verju. Í 1. hálvleiki hevði NSÍ vindin undan, men tað var trupult hjá teimum at koma í skotstøður, og Símun Rógvi Hansen í B71 málinum var tryggur.

At tað er tíðliga á árinum sást á bóltførleikanum og í tvørrandi skjótleikanum at fata støðurnar og velja mest eyðsýndu loysnirnar. Tá ið temjingarnar ikki eru tryggar, og loysnirnar ikki eru tær mest eyðsýndu, so er torført at halda bóltin í egnum raði. Eftir tvær, tríggjar og kanska fýra sendingar miseydnaðist tað ofta, og tískil gekk nógv fyri seg millum brotsteigarnar og við nógvum vendingum og fáum málmøguleikum.

Men NSÍ kendi sína vitjunartíð, tá ið hon so at siga var liðug. Eftir stútaran hjá Óla varð bólturin givin upp, og so bríkslaði Ransin Djurhuus fyri síðstu ferð!

## Svartur sunnudagur á Sandi

Frá at hava verið í fremstu røð sum málskjútti er Eli Hentze, sum hevur verið á fremsta B71 liðnum síðani 1986, nú á verjukendum miðvallarplássi. Hann hevur verið við, tá ið B71 hevur ferðast upp á tindin, niður í dalin og umaftur, og nú avbjóðingin er at fóta sær millum tey bestu, er hann framvegis við.

- Vit iðra okkum um úrslitið. Um marginalirnir vóru í okkara parti, so vunnu vit, men nú fingu vit einki. Tað er ómetaliga harmuligt. Leikliga avrikið haldi eg, at vit kunnu vera nøgdir við. Tað var eingin munur á liðunum, og NSÍ telist jú millum liðini, sum sokallaðu serfrøðingarnir rokna við fer at enda millum tey fremstu, staðfesti skilagóði B71 veteranurin.

## NSÍ venjarin var vónbrotin

Johan Nielsen hevur í tey næstan fimmti árini, hann hevur verið venjari, verið við til eitt sindur av hvørjum. Hóast liðið hjá honum fór av Sandi við øllum stigunum, so var hann vónbrotin av avrikinum:

- Vit vóru so hepnir, sum tað næstan ikki ber til at vera. Avrikið var av sovornum slagi, at tað ikki átti at borið trý stig við sær, men tað gjørdi tað altso kortini.

NSÍ helt, at spælið var út av lagi vánaligt, og at teir høvdu verið órutineraðir í tí, sum teir høvdu víst.

- Undirlendið var ikki serliga gott, men tað skal ikki vera orsøk at tosa seg burturúr, at avrikið var vánaligt. Kanska høvdu vit bóltin meiri enn sandoyingarnir, men vit megnaðu ikki at skapa tað, sum skal til fyri at vinna, staðfesti Johan Nielsen.